# EITT SPÆL AT FLETTA

**SLÁTUR** Høvdu teir gomlu vitað: Í dag tíma færri og færri at fletta. Tí velja mangir bøndur og privatmenn at senda flettingarlombini til Sláturmiðstøðina í Haraldssundi. - Ja, her koma menn við familjum sínum. Og meðan vit fletta seyðin, fara tey til Klaksvíkar at svimja. So skjótt kann tað ganga, sigur ein av flettarunum, Leon Sólheyg.



**BØNDUR OG PRIVATFÓLK**

*Trý ár eru liðin síðani teir byrjaðu at slátra á miðstøðini í Haraldssundi. Her koma bøndur við 150 seyðum, og privatfólk við 12 seyðum. Tað gongur skjótt fyri seg - einir 30 seyðir verða flettir eftir einum tíma*

## Ein smakk av heystinum

*– Okkara sannroynd er, at tað verða færri og færri sum fletta sum fletta sjálv. Tí er brúk fyri eini slíkari miðstøð sum hesi, sigur Leon Sólheyg.*
*Hóast flestu viðskiftafólkini bert eru áhugað í krovunum, vísir tað seg, at tey eisini vilja hava tað sum Leon nevnir »ein smakk av heystinum«, samstundis sum tey sleppa undan upptakinum aftaná. TAÐ vilja tey heldur betala seg frá.*
*– Ja, fólk vilja ikki hava ta stóru rúgvuna við sær aftur til húsa, men bert henda lítla smakkin av heystinum, slær hann fast. Ofta ynskja fólk sær bert tann eina sveitan og kanska okkurt annað úr innvølunum. Men í stóran mun verður restin burturbeind her á miðstøðini.*

Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

**Haraldssund:** Tað er týðiligt at síggja, at her er talan um menn sum vita hvat teir skulu gera, tá tað ræður um fletting.

– Tað er best, tá vit eru seks mans. Vit eru bara fimm beint nú, men tann sætti kemur um eina løtu, vísir Leon á, meðan tann stríðist við at skjóta eitt lambið fyri og annað eftir.

Serligi flutningsbilur teirra er júst komin norður um Norðoyatunnilin við seyði av Skálafjørðinum. Hinir menninir standa klárir við hvør sítt borð og við spølini, ið hjálpa og lætta munandi um flettingina.

Teir rigga skjótt til, hvør maður veit hvat hann skal gera: Ein skjýtur. Ein tummar. Ein togar skinnið av. Ein syrgir fyri at burturbeina vemburnar og alt hitt. Og uttanfyri er ein annar sum koyrir skinnini inn í eina bingju.

– Tað tekur eina løtu at koma í gongd. Men tá vit so eru komnir upp í umdrejningar, vita vit nærum ikki av, fyrrenn vit hava flett teir fyrstu 20 seyðirnar, sigur Leon, ið er ættaður úr Klaksvík.

Hann hevur hjálpt til her í eini trý ár, men er annars sjómaður við einum skipi úr Leirvík. Beint nú eru teir ikki til fiskiskap.

– So tað passar bara fínt við flettingina, sum jú bert er hesa ársins tíð – tað vil siga henda eina mánaðin.

– Onkutíð er nakað nógv press á, tí alt skal ordnast í sjálvari heystfrítíðini. Kanska burdi heystferian vart í tvær vikur, sigur hann við einum brosi.

**» Fleiri hava boðað frá, at teir fara at koma við eini 150 seyðum í hesi vikuni. Tað fara vit eisini at klára**

### 2-3 tímar

Hósdagin var úr at gera hjá teimum fimm monnunum á Sláturmiðstøðini – Leon, Fríðjohn, Ragnari, Jón og Elmar.

Beint eftir døgurða komu teir til Haraldssunds við einum innilokaðum lastbili, fyltur við seyði av Skálafjørðinum, og sum var klárur til flettingar.

– Her eru einir 50 seyðir, so tað skuldi eftir røttum ikki tikið meiri enn einar 2-3 tímar at fletta, greiðir Leon íðin frá.

**» Her eru einir 50 seyðir, so tað skuldi eftir røttum ikki tikið meiri enn einar 2-3 tímar at fletta**

Vanliga siga teir, at eru teir seks vandir mans til arbeiðis, kunnu teir lættliga fletta 30 seyðir um tíman. Ja, her fær ein nærum ikki vent sær, fyrrenn enn næsta gongan kann koma til flettingar.

Henda dagin hevði ein annar privatmaður, somuleiðis úr Eysturoynni, biðið um tíð at fáa einar 12 seyðir flettar. Og hetta skuldi takast inn ímillum seyðirnar hjá bóndanum.

– Um tað passar seg so, plaga vit at møta klokkan átta um morgunin og fara til hús aftur um 4-tíðina, sigur Leon.

Soleiðis gongur tað bara – hond í hond. Ella seyð av seyði.

### 70 seyðir

Sláturmiðstøðin hevur longu nøkur ár á baki. Undir verandi umstøðum, hevur miðstøðin loyvi at virka eftir galdandi lógum og reglugerðum fram til komandi heyst.

Líkt er til, at bøndur og privatfólk hava sæð hetta sum ein kærkomnan møguleika at fáa seyð sín flettan.

– Teir flestu koma sjálvandi higar úr Norðoyggjum, men nógvir koma somuleiðis úr Eysturoynni. Ja, tað koma eisini seyðir frá monnum í Havn, sigur Leon brosandi.

Ein av hentu møguleikunum hjá Sláturmiðstøðini er tilboðið um at koma eftir seyðinum hjá bóndanum. Við flutningsbili teirra, ið kann taka einar 70 seyðir, er lætt og einfalt at fáa seyðin koyrdan á staðið.

Tað er skjótt hjá royndu monnunum at fletta allar seyðin. Tá tað fer at nærkast endanum á flettingini, verða boð send til eigaran um, at nú kann hann so smátt fyrireika seg at koma norður eftir krovunum.

Men sesongin er stutt, og tí ræður um at arbeitt verður bæði skjótt og væl.

– Ikki bara onkur, men fleiri hava boðað frá, at teir fara at koma við eini 150 seyðum í hesi vikuni. Tað fara vit eisini at klára. Eingin ivi um tað, sigur Leon Sólheyg.

snorri@sosialurin.fo